Lesarabræv:

# Almennur tíðindaflutningur við politiskari slagsíðu

Hvønn leygardag sendir Útvarp Føroya samandrátt av føroyskum tíðindum í danska útvarpinum, tað er kærkomin tænasta fyri føroyingar búsitandi ella staddir, har danska útvarpið hoyrist. Men sera hugstoytt er at ásanna, at hesi tíðindi onkuntíð tykjast at hava álvarsliga politiska slagsíðu.

Í dag var at hoyra frá Útvarpi Føroya á donsku rásini, at einki var hent viðvíkjandi fyrireiking til gengransking í Føroyum, og nú eru vit um at liggja sjóvarfallið av okkum, og skyldina fekk Helena Dam á Neystabø.

Men tann, sum hevur havt høvi at hoyra Útvarpið hesa vikuna, veit, at landsstýriskonan hevur upplýst fyri Útvarpi Føroya, at fyrireikingararbeiðið er í gongd, men trupulleikin er, sum ikki einaferð, at ov lítið av peningi er tøkur til endamálið. Biðið varð um eina mill. kr., men játtaðar vórðu bert 400.000 kr. Hesar sera viðkomandi upplýsingar nevndi Útvarpið ikki á donsku rásini. Lurtarin fekk at vita, at gengranskingin er um at gleppa okkum av hondum, og skyldina fekk ein ávísur politikari, hóast Útvarpið sambært teirra egnu heimatíðindum er betri vitandi.

Um hetta ikki er almennur tíðindaflutningur við álvarsligari politiskari slagsíðu, hvat er tað so?

*Staddur í Norðsjónum*
*19.08.2000*
**Absalon Absalonsen**

# R. C. Effersøesgøta

Nú er stóra arbeiðið í R. C. Effersøesgøtu liðugt, og sigast má, at sera væl er frágingið. Serstakliga væl dámar mær gongubreytina fram við vegnum og annars tað, sum er gjørt í norðaru síðu. Vónandi fer broytingin, rundkoyringin við umleggingum, at roynast væl - bæði fyri fólk til gongu og akførini.

Tillukku við verkinum Tórshavnar kommuna!

Men tann, sum hevur áhuga fyri kommununi í sínari heild, má undrast, tí fleiri spurningar troka seg fram og biðja um svar.

Tað er avgjørt rætt at hugsa um ferðslutrygdina, men var tað neyðugt, at broyta vegin so fullkomuliga, til tess at fólk kunnu ganga trygg tvørtur um vegin? Hví gjørdi kommunan ikki bara ein gongutunnil frá bussteðgiplássinum og inn í SMS-túnið? Tað ber væl til har og tá vóru tey til gongu veruliga trygg. Nú skulu tey framvegis tvørtur um veg við nógvari bilferðslu og hvør er so batin? Og ferðsluljós rigga eisini væl aðrastaðni t.d. á horninum J. Paturssonargøtu og Fr. Petersensgøtu.

Ber ikki til at seta ferðina niður á ávísum støðum í býnum? Vit hava bæði løgreglu og ferðslulógir í Føroyum, men tað tykist ikki vera nóg mikið. Vit mugu eisini hava ymisk sløg av forðingum, t.d. bungur, buktir ella rundkoyringa,r her og har, annars verður koyrt alt ov skjótt. Er umleggingin í R. C. Effersøesgøtu ein ásannan av, at ferðsluskelti og aðrar ávísingar duga ikki og at ferðslulógin verður ikki tikin fyri fult? - Eisini í hesi nýggju rundkoyringini er ein løgin óslætti, tá ið tú kemur niðaneftir og inn í rundkoyringina. Mátti ikki verið neyðugt, tí tú hvøkkur við.

R. C. Effersøesgøta var í sínari tíð eitt tungt tak hjá kommununi, men hatta pettið, sum nú er so nógv broytt fyri nógvan pening (2-3 mill.kr.) var so snórabeint og væl sýnt, at so stór broyting mátti ikki verið neyðug. Skal nú kommunan fara undir at gera fleiri rundkoyringar á snórabeinum vegi til tess at tálma ferðini? Tá haldi eg, at tit eiga at hugsa fyrst um vegin frá Landssjúkrahúsinum og út til Dr. Dahls gøtu. Tað er ófatuligt, at einki verður gjørt við hann. Ofta verða vegastrekki nevnd deyðsfellur til tess at fáa býráðið at vakna. Hvarvið uttan fyri Landssjúkrahúsið átti at staðið ovast ía listanum! Men hóast so javnan hevur verið lovað, so hendir kortini einki; ikki tí, talan er ikki um nakað stórarbeiði. Hvussu raðfestir býráðið uppgávurnar? Tað skilst á øllum brøgdum, at við hetta lag skal Heiðagøta bíða leingi afturat!

Valla kemur tað illa við hjá privatu hundrað milliónа fyritøkuni SMS (og Apotekinum, ið verður rikið eftir handilsligum fortreytum), at kommunan ger sær so stóran ómak at lætta um atkomumøguleikarnar og annars leggur doyðin á at pynta uttan fyri dyrnar hjá landsins størsta handli. Hetta fer neyvan at skerja umsetningin, men hvussu við hinum handlunum í kommununi, har atkomu- og parkeringsviðurskiftini eru vánalig? Hvussu fer býráðið at greiða tann spurningin, ella eigur kommunan yvirhøvur at blanda seg?

Hvussu er og ikki, so hevur hetta málið eisini nakað við kappingarføri at gera. Fyri fáum árum síðani snúði alt seg um skeinkiloyvi - í rúgvuvís; tað skuldi vera so gott fyri kappingina, og býurin gjørdist áhugaverdur og livandi. Er sama hugsan galdandi fyri handilsvinnuna í kommununi?

Tað undrar eisini, at ráð eru til hasar rundkoyringina so stutt eftir »hungursárini«, tá ið vit via, at stórmál liggja á láni, t.d. skúlaviðurskiftini (høli/stovur) í vestara parti av kommununi.

**Regin av steinum**

Viðmerking

# Heldur ikki rætt, Torbjørn!

Í viðtalu við Sosialin sigur Torbjørn Jacobsen, landsstýrismaður, at hann á tingi boðaði frá, at Tónlistaskúlin skuldi liggja í Sandoynni og ikki *Lista- og handverksskúlin*, sum Signar á Brúnni hevur endurgivið Torbjørn Jacobsen fyri at hava sagt undir umrøðuni av løgmansrøðuni. Og Torbjørn J. leggur undirritaða undir at tvætla og hava misskilt seg.

Til hetta er at siga, at talan er ikki um nakra misskiljing frá mínari síðu, og fyri at rudda allar misskiljingar av vegnum, loyvi eg mær at endurgeva orðarætt tað, ið Torbjørn J. bar fram um nevnda mál á tingið undir viðgerðini av løgmansrøðuni. (Upptøkuna eigur Løgtingsskrivstovan). Orð hansara vóru hesi:

Handaverk og list er ein grein, ið lítla ella onga raðfesting hevur fingið í almennum reci. Tað er týdningarmikið, at vit menna føroysk handaverk og føroyska list við atliti til umhvørvi, tilfeingi og siðaarv okkara. Ein arbeiðsbólkur er settur niður at viðgera og lýsa spurningin um eina grundútbúgving í handaligum og listarligum greinum. Bólkurin hevur eisini til endamáls at finna fram til um ein grundútbúgving á hesum øki kann samskipast við seinasta árið í fólkaskúlanum. Tilmælið verður ætlandi liðugt í heyst.



Tað man kennast teim flestu rættiliga sjálvsagt, havandi alt hitt gávuríka fólkið í huga, at eitt nám og hartil hoyrandi umhvørvi verður skipað á hesum øki. Verður ein skúli sum hesin veruleiki, er tað sjálvsagt, at hann verður lagdur í útjaðaran. Tað kundi t.d. verði í Sandoynni, sum frammanundan fyri mongum árum síðani legði lunnar undir slíkan skúla, sum síðani hvarv, allarhelst av ov lítlum almennum áhuga. (citat endað).

Nú kunnu so lesararnir avgera, hvør ið hevur misskilt, og hvør hevur tvætlað.

Sjálvur komi eg til ta løgnu niðurstøðu, at Torbjørn J. hevur misskilt seg sjálvan.

**Signar á Brúnni**

## Ongin bani at koyra á

Tað er ov galið at selja motorsúkklur til børn á gongugøtuni, tí í Føroyum er jú ongin bani at koyra á.

**Tróndur Høgnason, 8 ár Tórshavn**

# Landsmet í ferðslu-trupulleikum

*Letur tað seg gera at prioritera vegagerðina Øravík – Hov fremri enn ásett í løguætlanini? vil Flemming Mikkelsen m.a. hava at vita*

Ólavur í Beiti

Flemmingi Mikkelsen, løgtingsmaður, hevur sett Finnboga Arge, samferðslumálaráðharra fyrispurning, og vil hava at vita, um tað letur seg gera at prioritera vegagerðina Øravík – Hov fremri enn ásett í løguætlanini? Um so er, eru tá ætlanir um, at tilfarið frá eini møguligari tunnilsgerð (Øravík-Hov) verður samskipað við nevndu ætlan um samferðsluhavn á Tvøroyri? Er støða tikin til, hvar á Tvøroyri nýggja samferðsluhavnin verður løgd?

Í viðmerkingunum sigur Flemming Mikkelsen, at nú Almanna- og heilsuskúlan ætlandi skal verða í Suðri er umráðandi, at samferðsluviðurskiftini í oynni verða so góð og trygg sum gjørligt soleiðis, at næmingarnir ikki verða noyddir at búgva á skúlaøkinum, men kunnu búðleikast hvar í oynni, tað skal verða.

**Yvir 100 mió. kr.**

Flemming Mikkelsen vísur á, at í løguætlanini, sum Karsten Hansen, landsstýrismaður, saman við landsstýrinum hevur lagt til rættis, stendur m.a., at vegakervið Øravík – Hov, sum hevur landsmet í ferðslutrupulleikum, fær eina løgujáttan upp á 100,8 mió. kr., sum verður endalig ár 2008, t.v.s. um 8 ár. Viðvíkjandi nýggjari samferðsluhavn á Tvøroyri er gjørd ein íløgujáttan upp á 75 mió. kr., sum eisini verður endalig ár 2008.

– Tá tað er greitt, at fráboðaði skúlin á Tvøroyri økir munandi um ferðsluna í oynni, og avgerð Tvøroyrar býráðs viðvíkjandi Drelnesi sum oljuhavn kann gerast veruleiki í nærmastu framtíð, metir undirritaði, at ætlaðu samferðsluútbyggingarnar í Suðuroynni hava skund, sigur Flemming Mikkelsen m.a. í viðmerkingunum.

# Statoil vil menna útbúgving og gransking

Jan Müller

Geir Jøssang er stjóri hjá Statoil fyri leiting í bretskum, írskum og føroyskum øki. Hann tók vegna AMG-bólkinum (Statoil, Phillips, Veba og Enterprise) ímóti loyvinum í Norðurlandahúsinum. Hann er væl nøgdur við úrslitið av runduni, serliga tá hugsað verður um ta sera hørðu kappingina. Tað teir hava fingið liggur innanfyri tað teir hava søkt og eisini millum 1. prioritetirnar. Hann vil ikki siga, um Statoil ætlar at bora í næsta ár, men tað fara teir at avgera innan fyri nakrar vikur. Statoilbólkurin hevur bundið seg til at bora tveir brunnar. Um teir taka boriskipið Vest Navion til Føroya hava teir ikki tikið støðu til enn. Tað borar í Grønlandi í løtuni. Teir eru eisini nøgdir við 9-ára loyvið, sum teir hava fingið saman við Anadarko.

Hvat viðvíkur tí føroyska innihaldinum so fer Statoil at halda fram við at stuðla føroyska útbúgving og gransking. Teir hava longu brúkt nógvar mill. til slíkt endamál. - Vit vilja vera við til at menna hetta, sum kann hava stóran týdning fyri vinnuna og samfelagið.



e-mail: jakup@sosialurin.fo

# Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum: www.sosialurin.fo

# Fýra ungir menn eru í bíðistøðu

*Hóast allir í landsliðshópinum eru afturvaldir, so siga venjararnir seg hava fýra ungar spælarar, sum ongantíð áður hava verið á landsliðnum, frammarlaga í huganum*

Allan Simonsen hevur tikið avgerð um, at allir teir átjan, sum vóru innkallaðir til dystin móti Danmark, skulu fáa boð til fyrsta HM undankappingardystin. Hann verður ímóti Slovenia annan sunnudag. Spælt verður á Svangaskarði, og dysturin verður kl. 15.00.

Tað hevur ligið á ljóði, at onkrar útskiftingar fóru at verða, men t.d. Bartal Eliasen og Christian Høgni Jacobsen mugu staðfesta, at landsliðsboðini, sum fleiri hava roknað við, at teir fóru at fáa, fara til allar teir átjan, sum spældu ímoti Danmark.



*Allir teir 18, sum vóru innkallaðir til dystin móti Danmark, verða boðsendir til fyrsta HM undankappingardystin*

**Trongligt í álopinum**

Jógvan Martin Olsen er hjálparvenjari hjá Allani Simonsen. Hann eygleiðir landskappingarydsitrnar og tosar við venjaran um einstøku spælararnar. Hjálparvenjarin ásannar, at hesa ferð vóru fleiri spælarar upp á tal, sum ikki hava verið á liðnum áður:

– Umframt Jákup á Borg og Heðin á Lakjuni, sum áður hava verið á liðnum, men sum hava verið eitt sindur óstøðugir síðstu tíðina, so eru á listanum fýra aðrir ungir spælarar. Men tá vit høvdu lagt saman og drigið frá, komu vit til tað úrslit, at akkurát nú var tað mest ráðiligt at velja teir somu átjan.

Hetta sigur Jógvan Martin Olsen, og hann hevur einki ímóti at siga okkum, hvørjir teir fýra nýggju spælararnir eru:

– Tað snýr seg um Andrew av Fløtum, HB, Christian Høgna Jacobsen, NSÍ, Súna Olsen, GÍ og Tór-Ingar Akselsen úr FS Vágum. Teir eru allir tætt at landsliðnum. Andrew av Fløtum hevur verið støðugir alt kappingarárið, meðan Christian Høgni Jacobsen hevur verið framúr síðstu tríggjar dystirnar. Um hann verður á sama støði komandi vikurnar, sum hann hevur verið síðani summarsteðgin, so verður hann skjótt í hópinum. Felags fyri Andrew av Fløtum og Christian Høgna Jacobsen er, at teir kappast móti Toda Jónsson, Una Arge og Kurt Mørkøre. Uni spældi seg avgjørt ikki av ímóti Danmark og Kurt Mørkøre hevur ikki enn rættuliga fingið møguleikan at vísa, hvør dugur er í honum á landsliðnum. Sunnudagin vórðu vit enn eina ferð mint á, at hann er sera málsøkin í norskum fótbólti, sigur Jógvan Martin Olsen.

Hjálparvenjarin vísir á, at tann av omanfyri fýra nevndu, sum tað nú hevði verið mest upplagt júst nú at tikið á liðið, er Tór-Ingar Akselsen:

Vit kenna hansara dygdir frá yngru landsliðunum og sjálvt um tað ikki hevur gingið nakað serligt hjá FS Vágum, so hevur Tór-Ingar oftast verið eyðsýndur. Fyri hann og okkum var tað óheppið, at hann hevur verið skaddur í fjúrtan dagar, tí tað er á vongplássinum í høgru, at vit ikki hava verið so hepnir tær síðstu ferðirnar.

Nær kunnu hesir so rokna við at fáa landsliðsboð?

– Tað veldst um, hvussu teir vera fyri komandi vikurnar, og um hvussu teir, sum eru á liðnum, vera fyri. Okkum hevði dámað best at fingið ungu menninar so líðandi inn í hópin. Vit hava nevnt møguleikan, at fleiri sleppa við á venjingarleguna í Spania, enn tað hava verið undanfarin ár, men enn er einki avgjørt hesum viðvíkjandi.

**Kreditturin**

Bartal Eliasen tykist ikki vera so nær úttøku, sum fleiri hava viljað havt hann at verið:

– Bartal og Hans Fróði líkjast heilt nógv í spælistíli. Hans Fróði er samanspældur við Óla Johannesen og Jens Kristian Hansen og tað er eingin orsøk at broyta upp á tað. Jóhannes Joensen og Jan Dam eru eykamenn hjá øllum miðverjunum og tí eru teir afturvaldir. Men eg skal ikki dylja, at vit hava umhugsað at velja ein álopsmann í staðin fyri ein verjuspælara. Tann møguleikin verður kanska meiri upplagdur, tá móstøðuliðið verður Luksemburg og ikki Slovenia, heldur Jógvan Martin Olsen.

Allan Mørkøre var ikki nøgdur við sítt avrik ímóti Danmark og venjararnir vóru heldur ikki nøgdir:

– Royndirnar skulu ikki undirmetast. Tað skal meira enn ein hálvvánaligur landsdystur til hjá einum spælara, sum hevur spælt 50 landsdystir, áðrenn hann verður avsettur. Tað sigur seg sjálvt, at royndirnar eru týdningarmiklar, men tað sigur ikki tað sama, sum at tað ongantíð fer at koma upp á tal at seta ein royndan spælara av. Allan Mørkøre hevur drigist við ein skaða og vit vóna, at hann verður betri fyri annan sunnudag, enn hann hevur verið síðstu vikurnar.

Átjan manna hópurin sær soleiðis ú Jákup Mikkelsen, Herfølge, og Jens Martin Knudsen, Leiftur, eru málverjar. Útispælararnir eru Óli Johannesen, AGF, Jens Kristian Hansen, B36, Hans Fróði Hansen, Sogndal, Jan C. Dam, B68, Jóhannes Joensen, HB, Allan Mørkøre, HB, Henning Jarnskor, GÍ, Øssur Hansen, B68, Fróði Benjaminsen, B68, Sámal Joensen, Leiftur, Julian Johnsson, Sogndal, John Petersen, Leiftur, Rógvi Jacobsen, KÍ, Kurt Mørkøre, Sogndal, Uni Arge, ÍA og Todi Jónsson, FCK.

**jh**



*Christian Høgni Jacobsen hevur verið framúr síðstu tríggjar dystirnar. Um hann verður á sama støði komandi vikurnar, sum hann hevur verið síðani summarsteðgin, so verður hann skjótt í landsliðshópinum*